Oljuráðleggingarnevndin havt fund :

Tíðarætlanin fer at halda

Ein av drívkreftunum í oljuráleggingarnevndini, Steffan Hultberg, fer helst úr nevndini. Hann skal taka við sum deildar tjóri í Energistyrelsen. DGU og GGU samanløgd

Oljuráðleggingarnevndin hevði í farnu viku ein av sínum vanligu fundum, hesaferð í Keypmannahavn. Á fundinum vórðu teir ymsu træðirnar savnaðir, og støðan gjørd upp, eitt nú varð greitt frá arbeiðinum í teimum ymsu undirbólkunum.

Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini sigur við Sosialin, at arbeiðið gongur sum tað skal, og tíðarætlanin heldur eisini.

Hann metir, at teir verða liðnir við uppskotið til eina oljulóg á sumri næsta ár og somuleiðis við útkastið til ta fyrstu útbjóðingarrunduna.

Landsstýrið og løgtingið skulu so viðgera hesi uppskotini. Fer henda viðgerðin at ganga sum ætlað, so verður klárt hjá Oljufyrisitingini at lata upp fyri ti fyrsta útbjóðingarumfarinum á føroyskum øki um árskiftið 1996-97.

Steffan Hultberg fer

Tað verður helst gjørd ein broyting í samansetingini av oljuráðleggingarnevndini. Steffan Hultberg, sum hevur umboðað DGU, (Danmarks Geologiske Undersøgelser) hevur fingið nýtt arbeiði, og fer hann tí helst úr oljuráðleggingarnevndini. Hann skal taka við sum deildarstjóri í Energistyrelsen. Hann skal taka sær av deildini, sum hevur við orkugransking at gera.

Steffan Hultberg hevur sitið í oljuráðleggingarnevndini frá byrjan. Hann er jarðfrøðingur og arbeiddi í 8 ár hjá BP í Bretlandi.

Hann telist millum teir jarðfrøðingar, sum halda góðar møguleikar vera fyri at finna olju og gass í føroysku undirgrundini.

Hann hevur annars verið rættiliga virkin í orðaskiftinum um eina komandi føroyska oljuvinnu og hevur m.a. ført fram, at føroyingar eiga at vera opnir fyri einum samstarvi við bretar, tá oljan sprýtir upp úr undirgrundini.

Í hansara stað verður helst valt annað umboð fyri DGU. Tað hevur ikki eydnast Sosialinum at fáa váttað, hvør tað verður, men tað skilst, at Flemming G. I. Christinansen verður nýggjur limur í oljuráðleggingarnevndini. Hann er leiðari fyri ti partinum hjá DGU, sum tekur sær av Grønlandi.

Broytingar á DGU

Blaðið skilur annars, at stórar broytingar verða gjørdar á stovninum DGU. Stovnurin er lagdur saman við GGU (Grønlands Geologiske Undersøgelser) soleiðis, at hesir báðir stovnar í framtíðini vera ein stovnur undir heitinum DGGU ella stytt GUS, sum stendur Geologiske Undersøgelser.

Við hesi samanlegging verður stovnurin munandi størri. Tað fer so aftur at gera, at jarðfrøðiliga vitanin og ekspertisan, sum føroyingar kunnu fáa, verður tað størri.

Føroyasektiónin á fyrrverandi DGU heldur annars fram eftir samanlegg-ingina. Møguliga í broyttum líki. Her er leiðarin Morten Sparre Andersen.

Sosialurin skilur, at nýggja avtalan millum Danmark og Grønland um leiting eftir og framleiðslu av olju úr grønlendsku undirgrundini hevur skundað undir umrøddu samanlegging av stovnunum.

jan

Steffan Hultberg hevur verið ein høvuðsdrív-megin í sambandi við alt oljumálið. Hann fer nú úr Oljuráðleggingarnevndini, tí hann hevur fingið arbeiði í Energistyrelsen.

Framhald av síðu 9

galdandi fyrrapartar og ikki leygardagar.

Men eisini tey, ið ynskja at brúnka sín kropp, eru vælkomin í Billugøtu 2 á Argjum. Í hesum sambandi hevur salongin eina sól við nýggjum rørum.

Saman við Torun arbeiðir ein næmingur í Salong Bylgjuni. Tey meta, at sum tíðirnar eru í dag, er ikki grundarlag fyri fleiri fólkum á eini slíkari salong.

Tey, ið dagliga fáast við at klippa v.m. merkja væl, at tíðirnar eru verri nú, tí tað gongur longri ímillum at fólk klippa sær. Eisini ringja fólk ofta og spyrja um prísir ella nær tilboð verður aftur.

Torun metir, at teirra prísir ongantíð hava verið so lágir sum nú. Tí tá meirvirðisgjaldið kom kundu tey ikki leggja 25% omaná prísirnar, tí tað høvdu fólk ikki ráð til. Úrslitið av hesum varð heldur, at salongirnar runt landið kravdu nøkulunda somu prísir frá kundunum, meðan tey ístaðin fingu so mikið minni í kassan.

Hon heldur annars, at fólk hugsa sera lítið um meirvirðisgjaldið og hvussu kostnaðarmikið tað er hjá teimum, ið royna at vinna sær nøkur oyru.

Í sambandi við, at Salong Bylgjan hevur latið upp á Argjum, eru nøkur upplatingartilboð, ið kunnu síggjast í lýsing aðrastaðni í blaðnum.

kar

Føroyski barnaskúlin í Århus

Summarfríttíðin hjá tí føroyska barnaskúlanum í Århus er av. Seinasta leygardag var fyrsti skúladagur.

Í skúlanum eru tveir flokkar, annar fyri yngri børnum og hin fyri eldri børnum.

Meðan børnini eru í skúla, kunnu foreldrini nýta Aarstovu sum teimum hugar. Tey kunnu fáa sær drekkamunn, lesa bløðini og práta við hini foreldrini.

Skúlin er annanhvønn leygardag frá kl. 11.00 til kl. 14.00. Næstu ferð 7. okt. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyingafelagið heldur til á Vestergade 48 D, í miðbýnum í Århus.

Aalborg

Hin føroyski sunnudagsskúlin er hvønn leygardag kl. 14 í Nørre Tranders Kirkecenter, Lemvigvej 100.

Bussur nr. 7 steðgar beint við.

Øll eru vælkomin.

Evangeliska Røddin

Odense: Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Samkoman Sion, Vágur

Sunnudag kl. 11.00: Morgunmøti.

Sunnukvøld kl. 18.00: Evangeliskur fundur.

Mánakvøld kl. 20.00: Bønarfundur.

VITIN, Århus

VITA-fundur verður leygardagin 7. okt. kl. 13.30 í Saronkirken, Langelandsgade 7, Århus C, nær við Vesterbro Torv.

Talari verður Símun Absalonsen.

VITA-børnini møtast samstundis.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

BØN- og bibliutími verður fríggjakvøldið 13. okt. kl. 19.30 hjá Sofiu og Finni Kier-Hansen, Stenaldervej 73 tv. og fríggjakvøldið 27. okt. kl. 19.30 hjá Maju & Marna Nielasen, Stenaldervej 113.

Bussur 14 koyrir til Stenaldervej.

Øll eru hjartaliga vælkomin eisini her.

Næsti VITA-fundur verður leygardagin 4. novemb-er.

VITIN, Århus, 08624-7773

LUTASEÐLAR

Hesir vinningar, sum notarius publicus tók 27.5.95, eru ikki avheintaðir:

1. Vikuskiftisferð fyri tvey við Atlantic Airways Føroyar/Keypmannahavn **4838**
2. Ferð fyri 2 Tórshavn-Bergen við Smyril Line **1345**
3. 500 l av olju frá Statoil **1452**
6. Vikuskifti fyri tvey á Hotel Føroyum **3412**
8. Íslendskt krov **2247**

Vinnarar mugu venda sær til Petur Weihe, tlf. 14400, í seinasta lagi 14. okt. 1995. Eftir henda dag falla vinningarnir burtur.

LIONS CLUB Tórshavn

Samband ynskist

Samband ynskist við kvinnu miðskeiðis í 30'unum. Tú mást ikki drekka. Eg havi egin hús. 100% tagnarskylda.

Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn, undir

Bill. mrk. 1020

KUNNGERÐ

Ársroknskapurin hjá Klaksvíkar kommunu fyri 1994 liggur frammi til alment eftirlit í døgunum 2. oktober til 13. oktober 1995, báðir dagar íroknaðir.

Klaksvík, tann 29. sept. 1995

Klaksvíkar Býráð

Samband ynskist

Maður fyrst í 50'unum ynskir samband við eina trúgvandi kvinnu. 100% tagnarskylda.

Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn, undir

Bill. mrk. 1010

Deksbátur til sølu

Frambygdur deksbátur, 35 fót.

Útgerð: spæl og seks snellur.

Útgerð í stýrihúsinum: sjálvstýran og GPS, lit ekkolodd, Koden, VHF, radarí 48 fjórðingar.

4 pers. gummibátur.

Tlf. 61560